## OPEC umhugsar niðurskurð

Oljuútflytaralondini í OPEC-felagsskapinum halda fund í Doha í morgin, og tað er ikki óhugsandi, at tey fara at gera av at skerja framleiðsluna.

Abdullah al-Attiyah, oljumálaráðharri í Qatar og formaður í OPEC, segði í gjár, at fundurin fer at viðgera allar møguleikar. Hann segði, at hóast oljuprísurin er høgur í løtuni, er tað ikki óhugsandi, at OPEC-londini fara at skerja sína framleiðslu. Oljuprísurin er hækkaður umleið 20 prosent seinastu tríggjar mánaðarnar, og í gjár kostaði ein tunna av norðsjóvarolju 27,98 dollarar á marknaðinum í London.

Ein høvuðsorsøk til fundin hjá OPEC er, at Irak væntandi fer at útflyta olju aftur seinni í hesum mánaðinum.

## Dýr ES-krøv

Nýggj trygdarkrøv, sum ES krevur sett sett í gildi á samferðsluøkinum, og sum eisini umfata Noreg sambært EBS-sáttmálanum, fara at kosta norðmonnum dýrt.

Nýggju trygdarkrøvini umfata millum annað ferjur, og tey bera millum annað í sær, at ein ferja, sum kann flyta umleið 100 ferðafólk, skal lúka somu trygdarkrøv sum ein ferja, ið kann flyta meiri enn 2.000 ferðafólk, skrivar Aftenposten.

Norska samferðsluráðið sigur, at bara 18 av teimum 53 norsku ferjunum, sum sigla uttanskers, lúka tey nýggju krøvini, og at tað væntandi fer at kosta einar 2,2 milliardir krónur at byggja nýggjar ferjur, sum lúka krøvini. Men tað er minni enn so alt, tí fleiri aðrar ferjur skulu umbyggjast og aðrar skiftast út, og tí væntar samferðsluráðið, at nýggju krøvini fara at kosta Noregi meiri enn 6,5 milliardir krónur.

ES samtykti tey nýggju trygdarkrøvini fyri fimm árum síðani, og málið er, at øll londini skulu lúka tey í seinasta lagi í 2010.

## Hermenn til Afrika

Amerikanska stjórnin hevur gjørt av at senda 69 hermenn til Mauritania og Liberia at verja amerikansku sendistovurnar har og at veita amerikanskum ríkisborgarum neyðuga trygd.

35 amerikanskir hermenn eru longu farnir til Liberia, har uppreistrardeildir hava tikið seg inn í sjálvan høvuðsstaðin Monrovia. Í gjár ljóðaði, at uppreistrarmenninir vóru stutt frá borgini hjá Charles Taylor, forseta. Samstundis verða 34 amerikanskir hermenn sendir til mauritanska høvuðsstaðin Nouakchott, har stjórnarherurin bardi eina kvettroynd niður hvítusunnudag.

USA fyrireikar seg eisini til at flyta amerikanskar ríkisborgarar úr teimum báðum vesturafrikansku londunum, og fleiri flogfør standa til reiðar at fara eftir teimum. USA hevur fyrr mælt sínum ríkisborgarum til at fara úr Liberia.

## Leita eftir gomlum milliardum

Bretsku myndugleikarnir hava givið amerikanska kavarafelagnum Odyssey Marine Exploration loyvi at leita eftir gullmyntum umborð á einum enskum herskipi, sum sakk uttan fyri Gibraltar í 1694.

HMS »Sussex« hevði eina millión gullmyntir í lastini, tá tað fór úr Portsmouth í desember í 1693 við kós ímóti Miðjarðarhavinum. Men uttan fyri Gibraltar sakk skipið, og bert tveir av teimum 500 monnunum, sum við vóru, sluppu frá vanlukkuni á lívi. Serfrøðingar meta, at gullmyntirnar eru einar 27 milliardir krónur verdar í dag.

Amerikanska kavarafelagið hevur seinastu tíðina leitað á leiðini uttan fyri Gibraltar og hevur funnið fleiri skipsvrak har. Eitt teirra er vrakið av MHS »Sussex«. Finna amerikansku kavararnir allar gullmyntirnar, skal bretski ríkiskassin hava umleið helmingin.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísrael ruddar ólógligar niðursetubygdir burtur



*Jødisku niðursetumenninir eru í øðini inn á Ariel Sharon, tí hann hevur lovað at flyta teir burtur. Her er ein teirra í hornatøkum við løgreglumenn*

**Annan hvítusunnudag fór ísraelski herurin undir at rudda jødiskar niðursetubygdir á Vestara Áarbakka burtur**

ÍSRAEL
*Árni Joensen:*

Í fyrsta umfari ruddaðu hermenninir ávaringarstøðir og annað hjá niðursetumonnunum, men samstundis kunngjørdi herleiðslan, at teir næstu dagarnar fáa fleiri niðursetufólk boð um at flyta burtur.Gera tey tað ikki við góðum, verða tey flutt við makt, segði herleiðslan.

Altjóða samfelagið sigur allar tær jødisku niðursetubygdirnar vera ólógligar, men kortini hevur ísraelska stjórnin góðkent 145 slíkar bygdir. Sambært friðarætlanini skulu ísraelsmenn flytast burtur úr øllum niðursetubygdunum, og palestinsku myndugleikarnir eru ikki nøgdir við tað, sum ísraelska stjórnin higartil hevur gjørt. Teir halda, at ísraelsku myndugleikarnir ætla sær bert at tøma hakrar ávaringarstøðir og at flyta tey, sum búgva í húsvognum, meðan hini sleppa at verða verandi.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, sigur seg tó vera nøgdan við, at Ísrael í hvussu er hevur tikið tað fyrsta stigið, og fyrradagin rósti hann bæði Ariel Sharon og Mahmoud Abbas fyri at halda friðarætlanina.

Palestinski forsætisráðharrin segði annan hvítusunnudag, at hann ætlar sær at halda fram við royndini at fáa teir víðgongdu palestinsku bólkarnar at semjast um eina vápnahvíld fyri at fáa enda á ófriðinum.

# Ikki aftur í Hvítu Húsini

**Hillary Rodham Clinton verður hildin at hava ein møguleika at gerast fyrsta kvinnan í amerikanska forsetaembætinum, men hon ætlar sær ikki aftur í Hvítu Húsini**

USA
*Árni Joensen:*



*Hillary Rodham Clinton við nýggju bókini »Living History«*

- Eg havi ongar ætlanir um at stilla upp til forsetaval, svaraði fyrrverandi forsetafrúan, tá sjónvarpið ABC spurdi hana, um hon ætlaði at gera eftir teimum mongu áheitanunum um at royna at gerast amerikanskur forseti eins og maður hennara, Bill Clinton.

Hillary Rodham Clinton situr í senatinum, har hon umboðar New York, og hon sigur, at hennara fremsta mál er at verða afturvald á valinum í 2006. Fleiri demokratiskir politikarar og kvinnufelagsskapir í USA hava í seinastuni mælt henni til at stilla upp til forsetavalið í 2008, men hetta tykist ikki hava hennara áhuga - ikki nú í hvussu er.

Fyrrverandi forsetafrúan hevur verið nógv umrødd seinastu dagarnar, eftir at hon í síðstu viku gav út eina bók við sínum endurminningum. Bókin hevur vakt stóran ans, tí hon umrøður millum annað sambandið millum Bill Clinton og Moniku Levinsky.

# ítróttur

Nr. 107 • mikudagur • 11. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hitaðu upp í Svimjihøllini




*- Teir hava jú ikki spælt so væl í seinastuni, og tað er heilt víst, at tað kann viðføra nakrar frustratiónir. Tað eru fyrst og fremst hesar, sum vit mugu royna at fáa fram í teirra spæli, men sjálvandi verður tað ein ótrúliga torført uppgáva, heldur Henrik Larsen um uppgávuna móti Týsklandi*

**- Tá leikararnir soleiðis eru savnaðir yvir langt tíðarskeið, kann tað blíva eitt sindur keðiligt við bara venjing og dysti, og tí hava leikararnir eisini tørv á at gera okkurt heilt annað, sigur Henrik Larsen**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað verður ikki tað heilt nógva av venjing, sum føroyska liðið hevur undan dystinum móti Týsklandi. Eftir heimkomuna leygarkvøldið gistu teir allir á Hotel Vágum, tó at Jákup á Borg fekk loyvi at fara ein túr heim til lítlu familjuna, sum hann nú hevur fingið.

Sunnudagin var so ein løtt venjing á Sørvági, og eftir hetta høvdu leikararnir frí í nakrar tímar, áðrenn teir aftur hittust. Hesa ferð á Hotel Føroyum, har landsliðið heldur til fram til dystin.

Mánadagin var ætlanin, at tvær venjingar skuldu verða á skránni, men Henrik Larsen hevði tó strikað tí seinnu av hesum, og sendi ístaðin leikararnar niðan í Svimjihøllina, har útlop av 5-metur vippuni og annars stuttleiki var á skránni.

### Tørv á fríløtum

Tað er ikki fyrstu ferð, at Henrik Larsen letur leikararnar taka sær eitt sindur av løttum undan landsdystum. Onkra ferðina hevur talan verið um at leiga bowlinghøllina á Hálsi, meðan biografsalurin hevur verið nýttur aðrar tíðir, og sjálvur hevur Henrik Larsen eisini sína heilt avgjørdu hugsan um, at hetta kann vera rætt at gera við hvørt.

- Sjálvandi er dysturin mikudagin umráðandi, men tað ræður eisini um, at leikararnir skulu vera væl fyri til uppgávuna. Tá talan er um tveir dystir á rað, eru vit jú eisini savnaðir nóg so intenst í eina góða viku, og tá kann tað gerast eitt sindur keðiligt, um talan bara er um venjing og aftur venjing, heldur hann.

- Tá kann tað ofta vera gott fyri leikararnar, um teir gera okkurt heilt annað eina løtu, soleiðis at tankarnir ikki bara snúgva seg um fótbólt, og tað er so tað, sum eg havi valt at gera. Nakað annað er so eisini tað, at vit hava tørv á, at leikararnir eru væl hvíldir til mikudagin, og tað var so eisini ein av orsøkunum til, at eg valdi at strika seinnu venjingina í dag.

Sjálvur hevur Henrik Larsen eisini góðar royndir av slíkum tiltøkum, sum fyri ein fótbóltsvenjara mugu sigast at vera eitt sindur ótraditionell. Í øllum førum var ein partur av fyrireikingunum hjá dønum undan EM-hálvfinaluni móti Hollandi í 1992 at fara á McDonalds at fáa sær ein burgara. Nakað sum av flestu serfrøðingum varð mett sum púrasta garvilt, tá leikararnir høvdu ein strævnan dyst fyri framman.

Hvussu tað spældi av hjá Ricardo, Henrik Larsen og hinum á liðnum, vita helst tey flestu, og um Henrik sigur, at hetta jú er partur av tí sama. At broyta gerandisdagin eitt sindur, so leikararnir ikki møðast av hvørjum øðrum.

### Bíðar til seinastu venjinga

Tá vent verður aftur til sjálvan dystin, heldur Henrik, at tað enn er ov tíðliga at seta nøvn á, hvussu liðið fer at síggja út.

- Tað er klárt, at eg havi gjørt mær nakrar tankar, men soleiðis sum leikararnir ganga inn fyri venjingini, er nokk best, at bíði við at seta liðið til í evstu løtu, sigur hann flennandi. Hetta seinasta skal nokk vísa til eina hending í mánadagsvenjingini, har Rógvi Jacobsen og Oli Johannesen vóru í eini ordiligari mannfólkatakling.

Men tú hevur í øllum førum ein positivan trupulleika í verjupartinum, har tveir leikarar koma aftur. Teir, sum røktu plássini í Íslandi hava í øllum førum ikki spælt seg av?

- Nei tað er so heilt víst, at teir ikki gjørdu. Tað var tað nokk ikki nakar sum gjørdi, sjálvt um eg kundi ynskt, at vit høvdu skapt meira. Nú havi eg sæð dystin aftur á sjónbandi, og faktist halda vit teimum nógv betri, enn eg trúi, og tað er er heilt víst eitt stórt herðaklapp til alla ta defensivu organisatiónina á liðnum, sigur venjarin.

Viðvíkjandi álopspartinum, skal í øllum førum ein broyting fremjast, nú Andrew er leikbannaður, men heldur ikki her vil venjarin siga nakað um, hvussu stillað verður upp.

- Har mugu vit so finna ein nýggjan leikara. Annað fái eg ikki sagt um tað, eru einastu boðini, sum Henrik Larsen hevur at siga í so máta.

Um týska liðið heldur hann, at teir eru undir stórum trýsti undan dystinum.

- Teir hava jú ikki spælt so væl í seinastuni, og tað er heilt víst, at tað kann viðføra nakrar frustratiónir. Tað eru fyrst og fremst hesar, sum vit mugu royna at fáa fram í teirra spæli, men sjálvandi verður tað ein ótrúliga torført uppgáva, og vit skulu í øllum førum spæla upp til okkara allarbesta, um vit skulu hava nakran møguleika, sigur Henrik Larsen at enda.